# Skrivstovufólk

**Til starvsfólkadeildina**

**Starvið**
ereitt fjølbroytt og spennandi starv, har tú kemur at taka tær av nógvum ymiskum uppgávum innan starvsfólka- og lønarøki, t.d. lønarútgjaldan, tilrættaleggja skeið og skriva ymisk skriv til starvsfólk..

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving og vera til reiðar at taka sær av nógvum ymiskum uppgávum. Kunnleiki til edv á brúkarastøði er neyðugur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum við Starvsmannafelagið.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 2. oktober 2000. Merk umsóknina "Skrivstovufólk".

Á starvsfólkadeildini, ið umsitur og hevur ábyrgdina starvsfólka- og lønarviðurskiftunum hjá teimum sum starvast hjá kommununi, starvast í løtuni fýra fólk. Harumframt eru tveir næmingar knýttir at deildini. Lønarútgjaldingin til tey umleið 900 starvsfólkini er umleið 110 mió. kr. um árið innan 14 sáttmálaøki.

# Pedagogar

**Í sambandi við at Býlingshúsið inni á Gøtu í november mánaða í ár letur upp útibarnagarð í skúlanum á Hvítanesi til 16 børn, verður søkt eftir tveimum pedagogum ávikavíst 40 og 30 tímum og einum hjálparfólki 30 tímar um vikuna.**

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum grannalagi, har náttúran hevur stóran týdning í dagliga arbeiðinum.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, og vera førur fyri sjálvur at taka avgerðir í arbeiði sínum, og at honum dámar at vera úti saman við børnunum.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til til Johonnu Hansen, leiðara, tlf. 317701, ella Katrin Petersen, samskiparara, tlf. 315160.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstyri.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving skulu vera Býlingshúsinum inni á Gøtu, Ovaragøta 30 A, 188 Hoyvík, í hendi, í hendi, í seinasta lagi 2. oktober 2000.

# Starvsfólk

**til Tilhaldið í Tórsgøtu.**

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir starvsfólki við drúgvum royndum og hóskandi útbúgving. Kunnleiki, hugur og hegni til at arbeiða við menniskjum er ein fyrimunur. Neyðugt er eisini at duga at arbeiða sjálvstøðugt, vera fyrikomandi, hava góð samstarvsevni og at hava áhuga í samfelagsligum viðurskiftum .

**Setunarviðurskifti**
Starvið er eitt hálvtíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum við Starvsmannafelagið.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Vanju Petersen, leiðara, tlf. 316491, ella Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25. september 2000, viðmerk umsóknina: "Starvsfólk".

Endamálið við Tilhaldinum er, at geva pensiónistum í Tórshavnar kommunu møguleika og umstøður til fjøltáttaða samveru í hugnaligum umhvørvi.

Tórshavnar kommuna



*Nú hevur tú møguleika at ogna tær*

## TALAÐA ORÐIÐ

frá Rhema Talandi Orðið

Orðið varð hold og tók bústað millum okkara

Sum nakað nýtt fer samkoman Rhema at geva út eina mánaðarkassett við áhugverdum evnum.

Hevur hetta tín áhuga, kanst tú tekna teg sum lim í kassettuklubbanum og fáa góða undirvísing við postinum hvønn mánað.

KOSTNAÐUR:
☐ Mánaðarkassett í 1 ár íroknað postgjald kr. 360,-
☐ Mánaðarkassett í 1/2 ár íroknað postgjald kr. 190,-

Ynskir tú at gerast limur setur tú kross við um tú vilt gjalda fyri 1/2 ella 1 ár, flytir peningin á konto í Føroya Banka nr. 6460 494 456 0 og tú fært bondini sendandi.

*Skriva navn og bústað á lepan*

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________ Tel. nr. __________

Postnr.: ________ Býur/bygd: ______________________

og send hann til:
**Rhema Bandtænastan, Postboks 1109, 110 Tórshavn**

ella ring bíleggingina inn á tel. nr. 31 01 91/31 39 61

# Skrivstovulærlingur søkist

Søkt verður eftir lærlingi til skrivstovu okkara.

Ert tú ágrýtin og nærløgd/lagdur kunnu vit bjóða tær læruapláss innan skrivstovuyrki.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum skal vera okkum í hendi innan 1/10-2000.

**Spf Grannskoðarastovan,**
**480 Skáli**
**Tlf. 44 16 66**

Vilt tú vita meira um okkum, kanst tú ringja til okkara og tosa við **Dianu Heinesen**.

# Kokkur/Økonoma

Søkt verður eftir tveimum kokkum/økonomaum til at gera mat til 25 mans, sum fara at arbeiða skiftivakt.

Meira fæst at vita um arbeiðið við at venda sær til skrivstovu okkara í Leynum ella við at ringja tlf. 421410 ella fartlf. 004524887655.

**NCC VÁGA KONSORTIET I/S**
FO-335 Leynar Tlf. 421410 · Fax 421650

## Spf Grannskoðarastovan søkir

# Grannskoðarar

Søkt verður eftir grannskoðarum til virki okkara.

**Starvið:**
Starvið umfatar umframt grannskoðan eisini fíggjarliga ráðgeving, serliga innan roknskap, mvg og skatt.

**Útbúgving:**
Liðug/liðugur við ella í ferð við hóskandi útbúgving so sum HD ella Merkonom. Roknast má eisini við luttøku á skeiðum bæði í Føroyum og uttanlands.

**Starvsroyndir:**
Í minsta lagi 2 ára royndir frá líknandi starv.

**Løn:**
Løn eftir avtalu.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum skal vera okkum í hendi innan 10/10-2000.

Meira fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara og tosa við **Eyðbjørg Thorleifsson** ella **Páll Højgaard**.

**Spf Grannskoðarastovan,**
**480 Skáli**
**Tlf. 44 16 66**



**Starv**

# BUSSFØRARAR

Strandfaraskip Landsins søkja við hesum eftir tveimum bussførarum til koyring á Bygdaleiðum at seta skjótast gjørligt.

**Fólkaflutningsdeildin**
Raksturin av Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum er fyriskipaður á fólkaflutningsdeildini.

Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá Strandfaraskip Landsins.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:
- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá bussføraranum**
Arbeiðsuppgávurnar hjá bussføraranum fevna um:
- Koyra fastar rutur og leigutúrar
- Innkrevjing av ferðaseðlum og kassaavrokning
- Veita upplýsing til tey ferðandi í bussinum
- Lasta viðføri hjá ferðandi
- Avgreiða smápakkar við bussinum
- Undir koyring verða við til at tryggja samskipan við aðrar bussar og skip/ferjur
- Tryggja at allar flutningsreglur verða hildnar
- Tryggja reinføri av bussinum, innan og uttan
- Hava eftirlit við, at bussurin er í tryggum mekaniskum standi
- Verða við til at tilrættaleggja størri og smærri viðlíkahaldsarbeiðir
- Saman við dagligu leiðsluni virka fyri betringum í tænastuni

Nærmast fyrisetti hjá bussførarunum er ferðslusamskiparin.

STRANDFARASKIP LANDSINS

**Førleikakrøv**
- Koyrikort til buss
- Royndir innan busskoyring og kollektiva ferðslu
- Heilsuváttan
- Útbúgving innan kundatænastu og koyriteknisk skeiðir er ein fyrimunur
- Kunnleika til ferðslulógina
- Kunna orða seg á enskum
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið gevur møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 25. september 2000, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hera Joensen, deildarleiðara.

Tlf. 343000 ella e-mail: hej@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til eina familju í Norðurstreymoy.

Málið við stuðlinum er, í neyvum samstarvi við avvarðandi barnaverndarnevnd og Almannastovuna og í samráð við heimið, at virka fyri eini stimbrandi og mennandi tilveru fyri familjuna sum heild.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, og stuðulin er fyribils játtaður fram til 31.03.2001.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi skjótast gjørligt og skulu stílast til:

**Almannastovan**
att. Petra Joensen, sosialráðgevi
Box 3096
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast á tlf. nr. 31 54 80 lokal 127 hjá Petru Joensen og lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

# Pleygufamilja

Søkt verður eftir einari pleygufamilju til trý systkin í aldrinum 12, 6 og 2 ár. Børnini eru væl virkandi.

Endamálið er at geva børnunum ein tryggan uppvøkstur. Tað er ein fyritreyt, at pleygufamiljan er sinnað at virka í samstarvi við familjuna hjá gentunum.

Arbeiðið verður skipað í samráð við barnaverndina í Klaksvík.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi reglum.

Áhugaðar familjur kunnu fáa nærri upplýsingar við at ringja til Tonju Ziskason, tlf. 456388.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi skjótast gjørligt.

**Barnaverndin**
**í Klaksvíkar kommunu**
Postboks 2 · 700 Klaksvík

# Lýsing um studning til stráfóður

Studningur til stráfóður verður veittur við heimild í fíggjarløgtingslógini fyri 2000.

**Fyri at fáa stráfóðurstudning skal niðanfyri standandi umsókn sendast Føroya Jarðarráð. Freistin at søkja er 1. oktober 2000.**

Vísandi til fíggjarløgtingslógina 2000 er allur landbúnaðarstudningur treytaður av at umsøkjarin:
1. er bókhaldsskyldugur sambært § 1B, pkt. 27 løgtingslóg nr. 75 frá 24. oktober 1978
2. er meirvirðisgjaldsskrásettur sambært løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 við seinni broytingum

Ljóstak av roknskapi fyri árið 1999 og MVG-skrásetingarprógvi, útskrivað í 2000, skal sendast okkum saman við umsóknini. (Eru tey áður send skrivstovuni er hetta óneyðugt). MVG-skrásetingarprógvið fæst við at ringja Toll- & Skattstovu Føroya, ið síðani kann senda okkum skjalið.

- turt hoyggj skal vera í hoyggjhúsi ella í des
- súrhoyggj skal vera
  1) í tøttum brunni og farg skal vera á brunnunum, sum ikki eru ásettir
  2) í koyribrunnum, sum eru pakkaðir nøktandi
  3) í rullubyrðum, sum eru pakkaðar nøktandi og tættar, og umsøkjarin skal hava nágreiniligt tal á hvussu nógvar hann hevur á hvørjum staði

Studningur verður veittur til:

1) framleiðarar, ið hava framleitt minst 5000 kg av mjólk í farna ári og/ella
2) framleiðarar, ið hava framleitt minst 4 tarvaslakt eldri enn 15 mánaðar og/ella minst 4 kvígur. Undantiknir hesum treytunum í pkt. 2 eru framleiðarar í: Mykinesi, Gásadali, Koltri, Skúvoy, Dímun og Fugloy

Studningur verður ikki latin fyri teir fyrstu 2 $m^3$, og síðan í mesta lagi fyri 12 $m^3$ pr. kúgv.

Studningur kann vera treytaður av at fóðurroynd, greinað á løggildari starvsstovu, vísir, at talan er um nýtiligt fóður.

Umroknað er: 1 $m^3$ av súrhoyggi tað sama sum 3 $m^3$ av hoyggi.

Ungneyt 1-2 ár verða roknað sum 2/3 kúgv. Ungneyt undir 1 ár verður roknað sum 1/3 kúgv.

Mjólkarvirkini senda yvirlit yvir framleiðararnar, ið hava latið mjólk til virkið.

Framleiðarar, ið hava selt mjólk privat, skulu hava váttan frá bygda-/býráð yvir framleiðsluna, og skal váttan fylgja við umsóknini.

Fyri seldar kvígur skal keyparin vátta. Fyri tarvaslakt verða váttanirnar í sambandi við umsóknir um kjøtstudning nýttar sum grundarlag.

*Tórshavn, tann 16. september 2000*

**FØROYA JARÐARRÁÐ**
Postrúm 50 · R.C. Effersøesgøta 4
FO-110 Tórshavn · Tlf. 31 11 80
Fax 31 11 85 · teldupostur: fj@fj.fo

**Umsókn til stráfóðurstudning 2000**

Fornavn: ______________________

Eftirnavn: ______________________

Bústaður: ______________________

Tlf./Fartlf.: ______________________

Seðilin skal sendast FØROYA JARÐARRÁÐ, Postrúm 50, 110 Tórshavn, innan 1. oktober 2000.